# AaB vann bronsuna

Um vikuskiftið spældi AaB avgerandi dyst ímóti OB um bronsuna í donsku superliguni. Tað var AaB, sum hevði munin í dystinum og vann 3-1. Harvið tryggjaði felagið úr Aalborg sær triðfremsta plássi í donskum fótbólti í ár.

Føroyski landsliðsspælarin Jón Rói Jacobsen sat á beinkinum allan dystin, meðan Súni Olsen, sum hevur verið skaddur, ikki var við í hópinum. Súni hevur tó vant í vikuni og er klárur til landsdystirnar í næstum.



# Venjarin bardist við spælara

Danska Ekstrablaðið vil verða við, at rok var millum venjaran og ein spælara hjá Esbjerg, tá ið liðið um vikuskiftið helt veitslu, nú kappingin endaði. Misnøgd hevur verið við leiðsluháttin hjá Troels Bech í Esbjerg, og sunnukvøldið brustu hann og Nicolai Høgh saman á einum vertshúsi. Sambært keldum hjá Ekstrblaðnum, hevði Troels Bech fingið nógv innanborða og irriteraði ein av sínum spælarum, sum vildi sláa hann. Áfast var millum teir báðar, men teir vóru skildir at.

# Greiður sigur men ivasamur taktikkur

**Formil 1 koyringin í Monako var ein stórsigur fyri McLaren Mercedes, og gleðisrómurin var øgiligur á liðnum, inntil ungi stjørnukoyrarin Lewis Hamilton var dekan ov opinskáraður, og avdúkaði, at liðið hevði nýtt ivasaman taktikk. Hetta kann enda við kolldøming av úrslitinum**

FORMIL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*McLaren bilarnir vóru fremstir frá byrjan til enda í Monako*

*mynd: Polfoto*

Formil 1 koyringin í Monako í ár var millum keðiligastu koyringar í langa tíð. Men eftirspælið kann gerast munandi meira áhugavert.

McLaren var nógv tað besta liðið á degnum, og Felipe Massa í Ferrari og Giancarlo Fisichellla fingu einki gjørt fyri at bjóða teimum silvurgráu bilunum av. Ja, móti endanum fóru McLaren bilarnir eitt heilt umfar framum Renaultbilin á fjórða plássi.

Hóast heimsmeistarin Fernando Alonso vann seg upp á eitt deilt fyrsta pláss í HM við formil 1 sigrinum í Monako, so var ungi liðfelagin Lewis Hamilton, ta einu løtuna heilt tætt aftan fyri Alonso, og hann sá út til at trýsta liðfelagan eina stutta løtu, áðrenn hann gavst við at trýsta og fekk enn eitt annað pláss. Hetta er fjórða annað pláss á rað fyri Hamilton, ið nú hevur koyrt fimm formil 1 koyringar. Í fyrstu koyringini fekk hann triðja plássið.

## Viðgekk liðboð

Sum so tyktist einki undarligt í, at Hamilton gavst við at trýsta Alonso, tí í Monako er nærum ómøguligt at fara framvið bilum, og yvirhálingarnar kunnu teljast á einari hond. Men eftir koyringina viðgekk Hamilton, at hann hevði fingið boð um ikki at trýsta ella fara framum liðfelagan Alonso. Sambært reglunum hjá FIA er tað ikki loyvt at brúka sonevnd liðboð, har ein av koyranum fær boð um ikki at fara framum hin. Motorítróttarfelagið FIA kannar tí McLaren sigurin í Monako.

Hamilton vísti á, at á hansara bili stóð eitt tveytal, og at hetta merkti, at hann var annarkoyrari hjá McLaren, og at hetta mátti hann bara góðtaka.

Serliga Ferrari hevur vunnið nógv við at hava greiðar fyrsta- og annankoyrara. Tó uttan at nakar hevur sagt hetta beinleiðis, og tí hevur tað ikki borið til at dømt liðið fyri tað. McLaren stjórin, Ron Dennis, hevur verið ein av teimum mest atfinningarsomu móti hesum áður, men tykist nú at vera dottin í somu grøv.

## Avgjørdu raðfylgjuna áðrenn koyringina

Ron Dennis vísir tó aftur, at tey brúka liðboð í McLaren. Hann sigur tó, at júst breytin í Monako er so serlig, at liðið frammanundan koyringini mátti gera av, hvør bilur skuldi vinna, og hvør skal gerast nummar tvey. Tí tað er nærum ógjørligt at fara framvið bilum á smalu breytini.

Fyri bretska liðið McLaren kann henda hending verða sera óheppin. Tí at eitt bretskt lið gevur einum spaniumanni, ið áðrenn koyringina lá nummar tvey í HM, fyrimun framum einum breta, ið lá nummar eitt í HM, kann vera ov nógv av tí góða fyri motorítróttar fjepparar í Bretlandi.

Ron Dennis er kendur fyri rættiliga kontanta viðferð móti fólki, ið ikki gera sum hann vil, tí er spurningurin, hvat hetta fer at hava av avleiðingum fyri Hamilton, ið man vera størsta stjørnan í formil 1 í løtuni.

## Ymiskur taktikkur

Umframt greiða McLaren sigurin, so var ikki nógv at skriva heim um í Monako. Nakrir bilar kláraðu seg væl í byrjanini, serliga Scott Speed í Torro Rosso, ið vann fimm pláss í byrjanini. Umleið helvtin av bilunum høvdu harafturat ein pittsteðg meðan hin helvtin hevði tveir, hetta var eisini við til at blanda kortini eitt sindur. Tó so, so gjørdi hetta ikki tann stóra munin fyri onnur enn Honda og Ferrari.

Kimi Räikkönen byrjaði av 16. plássi orsakað av óhappi í tíðarkoyringini. Hann royndi sítt besta, og hevði fullan bil av bensini í byrjanin, soleiðis koyrdi hann á mál við bert einum pittsteðgi. Við hesum eydnaðist honum at bjarga sær eitt stig. Hetta var tó mest orsakað av sera løgnari pittsteðgistrategi hjá Honda, sum í Barrichello og Button høvdu somikið tungar bilar í byrjanini, at eisini teir kundu havt ein pittsteðg. Men av órannsakiligum orsøkum valdu teir tveir pittsteðgir, og mistu sostatt stig.

**Úrslitið**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | McLaren-Mercedes | 10 stig |
| 2 | Lewis Hamilton | McLaren-Mercedes | 8 stig |
| 3 | Felipe Massa | Ferrari | 6 stig |
| 4 | Giancarlo Fisichella | Renault | 5 stig |
| 5 | Robert Kubica | BMW | 4 stig |
| 6 | Nick Heidfeld | BMW | 3 stig |
| 7 | Alexander Wurz | Williams-Toyota | 2 stig |
| 8 | Kimi Räikkönen | Ferrari | 1 stig |
| 9 | Scott Speed | STR-Ferrari | |
| 10 | Rubens Barrichello | Honda | |
| 11 | Jenson Button | Honda | |
| 12 | Nico Rosberg | Williams-Toyota | |
| 13 | Heikki Kovalainen | Renault | |
| 14 | David Coulthard | Red Bull-Renault | |
| 15 | Jarno Trulli | Toyota | |
| 16 | Ralf Schumacher | Toyota | |
| 17 | Takuma Sato Super | Aguri-Honda | |
| 18 | Anthony Davidson | Super Aguri-Honda | |
| 19 | Christijan Albers | Spyker-Ferrari | |

**Givnir**

- Adrian Sutil Spyker-Ferrari
- Mark Webber Red Bull-Renault
- Vitantonio Liuzzi STR-Ferrari

**HM fyri koyrarar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Lewis Hamilton | Ongland | 38 |
| 2 | Fernando Alonso | Spania | 38 |
| 3 | Felipe Massa | Brasilia | 33 |
| 4 | Kimi Räikkönen | Finland | 23 |
| 5 | Nick Heidfeld | Týskland | 18 |
| 6 | Giancarlo Fisichella | Italia | |
| 7 | Robert Kubica | Póland | 12 |
| 8 | Nico Rosberg | Týskland | 5 |
| 9 | David Coulthard | Skotland | 4 |
| - | Jarno Trulli | Italia | 4 |
| 11 | Heikki Kovalainen | Finland | 3 |
| 12 | Alexander Wurz | Eysturíki | 2 |
| 11 | Ralf Schumacher | Týskland | 1 |
| - | Takuma Sato | Japan | 1 |

**HM fyri lið**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | McLaren-Mercedes | 76 |
| 2 | Ferrari | 56 |
| 3 | BMW | 30 |
| 4 | Renault | 16 |
| 5 | Williams-Toyota | 7 |
| 6 | Toyota | 5 |
| 7 | Red Bull Racing Renault | 4 |
| 8 | Super Aguri - Honda | 1 |